# Miðvikan

Framhald frá síðu 15

hjá Kjølbro. Julius Gaard í Svínoy, sum róði út við Óla á Dalinum saman við pápa, segði mær, at hann plagdi at fara inn til Kjølbro við útróðrarboðum til pápa. Seinni búði pápi hjá Dáva í Gerðum um veturin.

Veturin 1921/1922 gekk pápi á skiparaskúla hjá Djurholm. Aftaná hetta var hann bestimaður hjá Dáva, sum hann eisini hevði verið við øll árini frammanundan. Ein túr í 1925 førdi pápi Solo. Bestamenn vóru Lassen og Julius á Viðareiði. Av manningini annars veit eg bert um farbrøður mínar, Karl hjá Høgna og Høgna Marius úr Lorvík og so Hendrik Hammer í Oyndarfirði, pápi Óla. Hendrik segði eina ferð, eg prátaði við hann, at frægari manning enn hana á Solo tað árið var ring at finna. Men ikki gekk væl við fiskiskapinum. Hann segði, at tað viðraði stak illa, og Solo var deyðsiglari. Eisini er sagt mær, at hon var ring at fáa at liggja.

## Brúdleypið mátti útsetast

Hóast eg ikki veit tað fyri vist, so hugsi eg mær, at mamma og pápi eru komin saman uppi hjá Dáva, tí mamma tænti har eitt tíðarskeið. Tey giftust 20. desember 1923.

Brúðarvígslan var annars lýst til tann 19., men hon var av ongum orsakað av veðri, og varð hon tí útsett til dagin eftir. Veðrið gjørdi eisini, at ikki var farandi húsanna millum. Poulina í Oyndarfirði, ein vinkona mammu, og Gunhild mostir, sum høvdu verið við til at gera til brúdleyps, svóvu í brúðarsongini hesa náttina. Tað skal bera við sær vanlagnu, sigst!

Hjúnarlagið gjørdist stutt, tí tað var bert seks ár seinni, at pápi fórst, og mamma sat einkja við fýra smádreingjum frá hálvum til 5 ára gamlir.

## »Ger pápa livandi aftur«

Ein lítil drongur stóð við grøvina hjá pápa sínum og sá mammuna gráta. Hann helt hendurnar saman og rætti tær upp um høvdið, hugdi sama veg og segði: »Góði Jesus pápi, ger pápa livandi aftur.« Og helst hevur henda inniliga áheitanin verið endurtikin fleiri ferðir. Men so við og við gjørdist greitt, at hon fór at vera úrslitaleys.

Hvussu ein slík ræðulig hending knappliga broytir alt, veit bert tann, sum upplivir tað, men lívið má livast víðari.

Hvussu tann fyrsta tíðin formaði seg, veit eg ikki at siga frá, tí eg var einans hálvfjórða ára gamal í mars 1930.

Tíðliga minnist eg, at vit vóru nógv hjá ommu og abba í Vági í Klaksvík. Mamma var nakað sjúk



*Fýra faðirloysingar. F.v. Hjørleif, Símun, Rólant og Hjalmar*



*Símun og Hjalmar Waag Høgnesen á grøvini hjá foreldrunum. Mamman doyði í 1964*



*Jóan Magnus og Turid Waag Høgnesen*

og var ikki arbeiðsfør eina tíð. Eg veit heldur ikki, hvussu úrkoma fekst ta tíðina. Í 1935 fekk mamma skúlan at vaska. Eg haldi, at hon fekk 80 krónur um mánaðin. Er hetta rætt verður tað góðar kr. 900 um árið. Tað var ikki so galið.

Til sammetingar kann sigast, at sambært Erlendi Patursson: Fiskiveiða-Fiskimenn høvdu um 75% av fiskimonnum um hesa tíðina eina ársinntøku, sum lá millum 600 og 900 krónur fyri umleið 7 mánaðir frá mars til september, tá skipini vóru í drift.

Tað vóru 10 skúlastovur at vaska og við ávísum millumbilum at fernisera. Kolovnur var í hvørjari stovu. Hvønn morgun skuldi kykast, so tað var heitt inni til innringingartíð. Vit beiggjar hjálptu til eftir førimuni. Eg kann so ikki siga, at mín partur kom á hædd við hinar. Menniskju eru so ymisk.

Mamma var eisini dúglig og iðin við stokkum, bara tógv var til. Men serliga til seyming var hon burtur úr. Seymimaskinan gekk bæði tíðliga og seint. Ógvuliga fá mundu pløggini vera, sum keypt vórðu uppá okkum. Tá ið mamma gav vaskiarbeiðið frá sær í skúlanum orsakað av krígsumstøðum, fór hon at seyma burtur av bæði fyri fólk og virki í bygdini. Hetta var tað, ið gav høvuðsinntøkuna.

Tað var enn ein smeitur hjá okkum, tá ið Palli pápabeiggi gekk burtur við Fossanes í 1938.

## Hugalig fólk sum logerandi

Ein roynd at fáa inntøkur var at hava fólk búgvandi, og tað minnist eg væl aftur á. Eg haldi, at hetta var við til at bøta um saknin hjá okkum um pápa.

Eg minnist serliga Aksel í Dali úr Havn, ið hevði fragd av at læra meg danskt. Eisini Ginki-Tummas úr Havn, ið hevði verið smiður í Føroyingahavnini, visti manga skemtiliga søgu.

Poul Andreas í Mikladali, har mamma hevði tænt sum ung genta, eigur eisini at nevnast sum eitt ljós, ið skaraði framúr. Hann hevði altíð onkur ráð. Hann kundi siga nógv við ongum orði. Men meginorðini vóru altíð: »Tað er einki, hygg uppeftir.«

So var tað Jensen, danskur el-maður, ið eg hvønn leygardag keypti ein pakka av Geleshag fyri. Pakkin kostaði 75 oyru. Tað 25 oyra, sum leyp av krónuni, eg fekk við mær, var lønin. Hetta vóru ikki smápengar tá. Jensen hevði radio, og tað gav eina serliga tign tá.

## Gott ummæli av pápanum og góð minni um mammuna

Sum árini eru liðin, og ein lítur aftur um bak, rennur mær ofta í hug, hvussu vinsæl fólk hava verið, og hvussu nógv hava greitt mær frá um pápa. Slíkt hevur fjálgað. Johanna Hvidbro plagdi at siga, tá ið eg kom við vøru til handilin hjá teimum: »Vit vóru javngomul, pápi tín og eg. Vit gingu í sama klassa. Ofta bað gamli lærarin pápa halda skil á skúlanum. Hann dugdi væl at rokna, men eg minnist serliga væl til, hvussu væl hann skrivaði.«

Tey bestu minnini eru sjálvandi um eina pliktuppfyllandi og kærleiksfulla mammu, ið brádliga fekk eina næstan óloysiliga uppgávu. Seinni segði hon ofta, at hana fekk hon megi til at loysa við teirri trúgv, hon fekk á ungum árum og ongantíð veik frá.

Í kirkju var altíð farið sunnudag. Eisini var farið í sunnudagsskúla og á møti í missiónshúsinum Emmaus. Her má eg nevna trúboðaran Alfred Petersen og hús hansara fyri teirra trúfesti og vinarlag allar teirra dagar.

Av talarum í Emmaus minnist eg best Elduvíks Jógvan, pápa Jákup og Fischer Heinesen. Hann sat á endanum á næstinnasta beinki vinstrumegin og stillaði seg við ørmunum á kross, tá ið hann hevði orðið. Eg haldi, at hann hevði eina norska bíbliu, ella var tað úttalan, sum gjørdi, at eg helt tað.

Men eg minnast enn, tá ið hann las: »Kast dit brød på vandet, og du skal finde det længe efter«. »Ja, boyggi,« segði hann so, meira minnist eg ikki.

Ein annar talari var Samson, deknurin. Eg minnist einaferð, hann las um Zakeus, ið var so lítil av vøkstri og tí var farin upp í eitt træ at síggja Jesus. Tá Samson greiðir frá, hyggur hann upp, eins og hann sær Zakeus og sigur: »Zakeus kom niður!« Meira minnist eg hann ikki siga. Men hetta var so lívagtugt, at vit vendu okkum fyri at vita, um Zakeus var at síggja. Onkur haldi eg smíltist.

## Sangurin hjá pápa

Heima var ofta borðbøn ella borðsangur. Altíð varð lisið Faðirvár og sungin sangurin »Takk Harri fyri hendan dag,« sum pápi hevði yrkt. Hann er nr. 735 í Missiónssangbókini og ljóðar soleiðis:

*Takk Harri fyri hendan dag*
*sum eg nú havi livað,*
*men synd mína, eg biði teg*
*í himli ikki skriva.*

*Eg mammu míni vildi gjørt*
*alt gott ta stund eg livi;*
*og Jesus, vildi tú meg ført*
*og tína kraft mær givið.*

*Og eg mín pápa líða vil,*
*tí hann er okkum góður,*
*ein góðan drong Gud ger meg til*
*hjálp mær at vera fróður.*

*O, Jesus Kristus hjálp tú mær*
*á øllum illum vinna,*
*at elska beiggjarnar meg lær*
*og alt hitt góða inna.*

*So veit eg Jesus, at tú vilt*
*mín góði faðir vera,*
*meg varða frá at gera ilt*
*men satt Guds barn at vera.*

*Ver Jesus hjá okkum í nátt*
*við tínum einglaskara*
*og hvønn ein dag á allan hátt*
*oss verja væl og varða.*

Tað er annars eitt sjáldsamt samantreff, at tveir av teimum níggju monnunum, sum doyðu við Ernestinu, eru umboðaðir í Missiónssangbókini. Tað kann vera nevnt, at Hjalmar, sonur Jóan Magnus, eisini eigur sálmar í hesi songbók.

## Gjørdist abbi uppá tíman 20 ár eftir vanlukkuna

Meðan tú situr og starir at hesum løgna mosaikki til tess at skilja tað, hann rúmar, so er tað eins og tú hoyrir eitt hvølt afturljóð frá barnaárunum taka aftur í aftur, at »tað er ikki alt millum himmal og jørð, ein kann fata.« Hesin mosaikkur, ið noktar at gerast heilskapaður, rúmar millum alt tað, mannaskilið helst kann greina, eitt merkiligt loynifyribrigdi.

Eg giftist í 1949, og vit fingu fyrsta sonin árið eftir. Hann var